

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 10 - 2013

# Bill Justinussen- Kortanei til brúgv um Skálafjørðin

Spurningurin um at gera eina brúgv um Skálafjørðin sum part av tunnilsverkætlanini í Eysturoynni, ið hevur verið nógv umrødd í almenna kjakinum í seinastuni, varð eisni havdur á lofti undir fíggjarlógarviðgerðini á tingi fyrrapartin. Umboðið fyri ein av samgonguflokkunum, Bill Justinussen úr Miðflokkinum, gjørdi púra greitt, at flokkur hansara fer ikki at ganga við til at gera brúgv um Skálafjørðin til part av tunnilsverkætlanini. Tað kemur ikki uppá tal at atkvøða fyri eini brúgvaloysn, segði Bill Justinussen uppá spurning frá einum av tingfólkunum. Tað var herfyri, at tunnilsmálið í Eysturoynni fekk eina bráddliga vend, tá tað kom fram, at Landsverk í sínum tilmæli til verkætlanina skjýtur upp at gera eina brúgv um fjørðin til part av samlaðu loysnini. Hetta skuldi gera ætlanina 200 mill. kr. bíligari umframt aðrar fyrimunir fyri brúkaran. Hetta var sum at festa eld í eina longu sera eldfima ætlan og hava bæði tingfólk úr Eysturoynni og lokalpolitikarar víst aftur eini brúgvaloysn við tí grundgeving, at hon forðar fyri menningarmøguleikum á fjørðinum í framtíðini. Her verður m.a. hugsað um eina framtíðar oljuvinnu, sum kann hava tørv á at taka stórar oljupallar inn á fjørðin. Størsta kommunan við fjørðin, Runavík, hevur í síni framtíðar ætlan fyri fjørðin, lagt eitt stórt øki millum Skála og Skálabotn av til oljuútgerðarhavn. Í tí sambandi verður eisini hugsað um at kunna brúka skipasmiðjuna á Skála í sambandi við umvælingar av oljupallum og eisini niðurtøkur av oljupallum, decommissioning. Mett verður at ein brúgv um fjørðin fer heilt at forkoma eini slíkari ætlan. Mynd: Hesa tilgjørdu myndina legði varaborgarstjórin í Runavíkar kommunu, Tórbjørn Jacobsen fram saman við kjakgrein herfyri.